Starvslýsing

Heimatænastan: Vágar / Norðstreymoy

Endurlýsing

## Avloysari fyri sjúkrarøktar-frøðing í Heimatænastuni

Søkt verður eftir avloysara fyri sjúkrarøktarfrøðing í barnsburðarfarloyvi at arbeiða í skiftandi vaktum í starvsbrøki 0,6 í tíðarskeiðinum: 15. desember 2009 fram til 30. september 2010

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til økisleiðaran tlf. 762201 .

**Umsókn**
Umsókn saman við prógvi verður at senda til :

Heimatænastan Vágar/Norðstreymoy
Stílað: Sonja Klein, økisleiðari
Hornaveg 12
370 Miðvágur

**Umsóknarfreist: 8. desember 2009**

Nærverkið veitir tænastur til borgarar við serligum tørvi, sum búgva heima, á bústovnum ella á sambýlum. Vit skapa møguleikar fyri lívsgóðsku við støði í tørvi og førleika hjá tí einstaka. Okkara eyðkenni er, at starvsfólkið leggur dent á professionalismu, dygd og nærleika. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almannamálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru tríggjar deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan og Stuðulstænastan. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Argjavegur 26 · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn
Tel 360000 · Faks 360001 · naerverk@naerverk.fo · www.naerverk.fo

www.naerverk.fo

---

ADVOKATSKRIVSTOVAN
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv. ft.

# TIL SØLU

Vegna Sp/f FT Smíð í konkurs, skrás. nr. 4267, verða hesar ognir lýstar alment til sølu fyri hægstbjóðandi:

– Citröen Jumpy vøruvognur, árg. 2000, skrás. nr. LA 833
– Nissan Cabstar vøruvognur, árg. 1997, skrás. nr. BD 783
– Brenderup viðfestivognur, árg. 2006, skrás. nr. VT 548
– Forskalling við tilhoyri
– Stillas
– Hegnstykkir
– Amboð: Tvær el-sagir, ein kompressari og nakað av handamboðum

Bjóðast kann uppá ognirnar hvør sær ella samlað, tó undantikið amboðini, ið bjóðast skal uppá samlað.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Óla Jákup Kristoffersen, advokat, ojk@jura.fo ella skrivaran Elina Svínoy, els@jura.fo.

Somuleiðis síggjast myndir inni á heimasíðuni www.jura.fo

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TEL 35 33 35 · FAX: 35 33 36 · WWW.JURA.FO

---

VINNUMÁLARÁÐIÐ

## Søkt verður við hesum eftir stjóra til Jarðfeingi

**Arbeiðsøki**
Høvuðsuppgávurnar hjá stovninum eru at:
- Fyrisita kolvetnisleiting á føroyskum øki
- Kortleggja, savna og varðveita jarðfrøðiligt tilfar umframt at granska, ráðgeva og kunna um jarðfrøðilig evni og viðurskifti
- Standa fyri og luttaka í vísindaligum kanningararbeiði av týdningi fyri ásetan av landgrunsmarki og fyri gagnnýtslu av ráevnum
- Ráðgeva Vinnumálaráðnum í elveitingarmálum
- Virka fyri øktum kolvetnisvirksemi og -íløgum, umframt røkja uppgávur av líknandi slagi

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum av umsøkjarunum, at tey m.a. hava:
- Hóskandi útbúgving frá hægri lærustovni
- Leiðsluroyndir innan almenna ella privata umsiting
- Royndir innan arbeiðsøkini hjá stovninum
- Góðar samstarvseginleikar umframt mennandi leiðslustíl

**Vit kunnu bjóða**
Vit kunnu bjóða eitt fjølbroytt og avbjóðandi starv í einum umhvørvi á høgum fakligum stigi.

**Løn og setanartreytir**
Setanarøkið er Vinnumálaráðið og stovnar undir ráðnum.

Starvið verður lønt ájavnt við 38. lønarflokk hjá Tænastumannafelag Landsins, men uttan at talan er um tænastumannastarv. Viðvíkjandi setanartreyt-um annars, verður víst til avvarðandi sáttmála.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, CV o.ø. skulu sendast til: Vinnumálaráðið, Tinganes, Postboks 377, 110 Tórshavn. Umsóknir skulu verða Vinnumálaráðnum í hendi í seinasta lagi 10. desember 2009 kl. 15.00.

Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Starvið verður sett skjótast til ber. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Arna Poulsen, aðalstjóra í Vinnumálaráðnum, tlf. 306600.

**Jarðfeingi**
- Er stovnur undir Vinnumálaráðnum og verður hann skipaður sambært reglugerð. Stovnurin fyrisitur kolvetnisvirksemi. Fyrisitingarligu uppgávurnar fevna m.a. um: eftirlit við leitivirkseminum eftir kolvetni, fyrireiking av útbjóðingarumførum og uppskot um dagføring av lógarverki.
- Er vísindaligur kanningarstovnur. Ein av høvuðsuppgávunum hjá stovninum er at savna og breiða út kunnleika um viðurskifti av týdningi fyri gagnnýtslu og varðveitslu av landsins jarðfrøðiligu náttúruvirðum.
- Er ráðgevandi hjá Vinnumálaráðnum í elveitingarmálum og luttekur í verkætlanum við tilknýti til elveiting.
- Virkar fyri at økja kolvetnisvirksemið v.m.

Tilsamans 28 fólk arbeiða á stovninum.

---

# Landsfundur Fólkafloksins

**Landsfundur Fólkafloksins verður leygardagin 28. november á Hotel Hafnia í Tórshavn.**

www.folkaflokkurin.fo

---

# Jólasøla 2009

Árliga jólasølan hjá Føroya Heimavirksfelag verður í ár 28. og 29. november í Ítróttarhøllini á Hálsi. Á sølubásunum verður eins og undanfarin ár, eitt stórt úrval av heimavirkaðum lutum/pløggum, bæði virkað síðbundi føroyskt og við nýggjum íblástri. Eisini verður café á staðnum við føroyskum viðskera og onkrum søtum omaná.

**Opið verður hesar tíðir:**
**Leygardagin frá kl. 10.00 - 19.00**
**Sunnudagin frá kl. 14.00 - 19.00**

Atgongumerkið kostar kr. 30,00 fyri vaskin, meðan børn upp til 14 ár hava ókeypis atgongd.

Vit skulu eisini gera vart við, at ikki ber til at gjalda við gjaldskorti á flestu básunum.

FØROYA HEIMAVIRKIS FELAG

---

# *Jólasølan*

*á Verkhúsinum Stíggjur 2009*

*Hósdagin 26. novembur kl 14-18.*
*Fríggjadagin 27. novembur kl 14-18.*
*Eisini verður málningaframsýning, tombola og kaffisøla.*

***Øll eru hjartaliga vælkomin.***

*Verkhúsið Stíggjur*
*Saltangará*